# Vinnupolitikkur er ikki sosialpolitikkur

**Stendur tað til nýggja valevnið hjá Sjálvstýrisflokkinum í Suðurstreymi, Malan Johansen, fáa kreppuraktu vinnurnar ikki eina krónu í stuðuli. Hon heldur eisini, at útlendingar eiga at hava betri møguleika at koma í føroyskt vinnulív**



*Nýggja valevnið hjá Sjálvstýrisflokkinum í Suðurstreymi, Malan Johansen, dylir ikki fyri serliga vinnulívið hevur hennara stóra áhuga. Hon heldur ikki tað er rætt at geva føroyska vinnulívinum stuðul, hóast fleiri vinnur so dánt hóra undan.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

NÝGGJ VALEVNI
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

At vera vinnulívsmaður skal ikki altíð vera nakar dansur á rósum. Hetta er beinrakni boðskapurin hjá nýggja stjørnuskotinum hjá Sjálvstýrisflokkinum í Suðurstreymi, Maluni Johansen. Hon vil ikki hoyra nakað um almennan stuðul til ali- ella rækjuvinnuna og hon heldur tað er burturvið, at føroyingar framhaldandi halda fast um, at útlendingar skulu haldast uttan fyri føroyskt vinnulív.

Malan Johansen stillar fyri fyrstu ferð upp til løgtingsval og hon dylir ikki fyri, at vinnulívið hevur hennara størsta áhuga. Hóast hon fyrst sýtti fyri at stilla upp, eydnaðist tað kortini Sjálvstýrisflokkinum at sannføra Maluna um at taka eitt tørn fyri flokkin í Suðurstreymi.

### Stórt trýst

Malan Johansen hevur nomið sær útbúgving innan búskaparfrøðina og hon starvast í dag í Vinnuhúsinum. Hjartamálið hjá Maluni er eisini vinnulívið og hon er rættiliga avgjørd, tá vit spyrja hana um tað almenna eigur at veita kreppuraktu ali- og rækjuvinnuni stuðul.

– Tað er ógvuliga stórt trýst á politikkararnar at geva stuðul, men tað er alneyðugt at hildið verður fast um ikki at veita stuðul. Uppgávan hjá tí almenna er fyrst og fremst at veita vinnulívinum karmar og ikki geva tí stuðul, sigur Malan Johansen frá.

Nýggja valevni hjá Sjálvstýrisflokkinum sigur, at tað er neyðugt hjá vinnuni at virka undir teimum umstøðum, sum einaferð eru. Hon ber stóran ótta fyri at um stuðul verður veittur til rækjuvinnuna, fara bæði alivinnan og flakavinnan eisini at gera vart við seg og krevja stuðul.

Malan vil ikki hava, at føroyskur vinnupolitikkur gerst til eitt slag av sosialpolitikki, har vinnulívið fær hjálp, hvørja ferð tá á stendur.

– Eg veit, at tað er hart hjá rækjuvinnuni í løtuni og fleiri fólk eru í vanda fyri at missa arbeiðið. Tað er kortini betri í longdini fyri vinnuna, um hon ikki fær stuðul. Uttan stuðul er vinnan noydd at tillaga seg til umstøðurnar og tað er betur í longdini, greiðir Malan Johansen frá

### Veð og útlendingar

Karmar fyri vinnulívið. Henda vending hoyrist frá nærum hvørjum valevni undir valstríðnum, men verri gongur at fáa valevnini at greiða ítøkiliga frá, hvørjir karmarnir skulu verða. Vit spyrja Maluna, um hvørjir karmar politiski myndugleikin eigur at geva føroyska vinnulívinum

- Taka vit eitt nú alivinnuna, haldi eg, at føroysku fíggjarstovnarnir skulu hava rætt til at fáa veð í aliloyvunum. Útlendingar eiga eisini at fáa størri leiklut í alivinnuni, enn teir fáa í dag. Hetta er ítøkiligir karmar, sum tað almenna eigur at geva vinnulívinum at virka undir, sigur nýggja valevni hjá Sjálvstýrisflokkinum.

Malan sigur seg ikki skilja stóra óttan fyri útlendskum pengum í føroyskum vinnulívi. Stendur tað til hennara, skulu útlendingar hava møguleika fyri at eiga 100% í alivinnuni. Hon setur kortini ta treyt, at aliloyvini verða nýtt á føroysku firðunum.

– Útlendingar kunnu geva føroyingum holla vitan, sum føroyingar kunnu læra nógv av. Tað má eisini verða positivt, at útlendingar taka eina risiko í føroyskum vinnum, so at føroyingar sleppa undan, og tí skilji ikki heilt stóra óttan fyri útlendskum pengingi, vísir Malan á. møguliga leggja okkurt afturat

### Eingin búskaparkreppa

Malan Johansen er ikki samd við teimum, sum vilja vera við, at føroyska samfelagið er aftur á veg í eina stóra búskaparliga kreppu. Hon ásannar, at føroyski búskapurin hevur í løtuni eina niðurgongd, men sum heild er føroyski búskapurin væl fyri.

Valevnið hjá Sjálvstýrisflokkinum vísir á, at bæði gjaldførið hjá landinum og fíggjarstovnum er gott. Føroyska vinnulívið er eisini nær um skuldarfrítt og útlandsskuldin hjá føroyska samfelagnum er netto 4. mio. krónur, og ti metir Malan, at tað er at gera ov nógv av at tosa um eina stóra búskaparkreppu í føroyska samfelagnum.

### Hevur førleikan

- Sjálvstýrisflokkurin er ein pragmatiskur flokkur, sum fyrst og fremst arbeiðir fyri at finna loysnir heldur enn at halda fast í fastløstum ideologium. Vit hava eisini ein stig fyri stig politikk á sjálvstýrisøkinum og flokkurin hevur eisini ein liberalan politikk, sum eg fult taki undir við

Malan Johansen er rættiliga sannførd um, at hon er komin á røttu politisku hillina við at stilla upp fyri Sjálvstýrisflokkin. Hon hevur altíð havt stóran áhuga fyri politikki og nú møguleikin at stilla upp beyðst, hevur hon valt at royna seg. Maluni dámar at væl at kjakast og hon metir seg hava neyðugu førleikan og viljan til at fremja nøkur politisk mál í verki.

### Búskapurin avgerandi

Malan Johansen sigur seg raðfesta sjálvstýrismálið høgt. Spurd, um hvussu skjótt blokkstuðulin eigur at lækka, svarar Malan, at blokkstuðulin eigur at lækkaður í tráð við yvirtøkurnar av donskum málsøkjum.

Nógvir flokkar hava eins og Sjálvstýrisflokkurin sagt seg verða sinnaðan at lækka blokkstuðulin eftir búskaparligu gongdini í føroyska samfelagnum.

Spurd, um hvussu høgt Sjálvstýrisflokkurin raðfestir ein blokkniðurskurð, svarar Malan, at flokkurin raðfestir niðurskurðin høgt og flokkurin vil arbeiða miðvíst ímóti. Hon leggur tó dent á, at fíggjarliga sjálvbjargni má verða ein fyritreyt fyri politiskum sjálvbjargni.

## Stutt um...

Malan Johansen er 37 ára gomul. Hon er bæði fødd og uppvaksin í Havn. Hon starvast í dag í Vinnuhúsinum, har hon serliga hevur oljuvinnumál um hendið. Malan hevur lisið búskaparfrøði á Handilsskúlanum í Keypmannahavn. Eftir lokna útbúgving í 1993 fór hon í starv á Føroya Landsbanka.

Hon arbeiddi í landsbankanum til 1996, tá hon gjørdist fulltrúi í kommunusamskipanarnevndini. Í 1998 gekk leiðin til Onglands, har Malan í fimm mánaðir starvaðist hjá oljufelagnum, Lasmo. Heimafturkomin til Føroya fór hon í starv í Sjónvarpi Føroya.

# ítróttur

Nr. 9 • hósdagur • 15. januar 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Finalistarnir funnir

**Dráttur og ÍF vórðu liðini, sum vunnu rættin til at spæla ímóti SÍ og TB í steypafinalunum í flogbólti**



*Eisini hjá kvinnunum tapti heimaliðið finaluna. Her gjørdist tað Dráttur, ið vann kappingina*

*Mynd: SáH*

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Um vikuskiftið varð árliga Mjølnir-kappingin fyri vaksin í flogbólti leikt. Hjá teimum bestu liðunum er hetta kappingin, har seinnu finalistarnir til steypafinalurnar skulu finnast, og tí er einki at siga til, at stór orka verður løgd í kappingina.

### Nýggir vinnarar

Fyrsta av ymsu kappingunum, sum eru á skránni í flogbóltsárinum, var Fleyrkappingin, og her eydnaðist tað SÍ hjá monnum og TB hjá kvinnum at vinna seg fram til finaluna.

Hvørgin teirra endaði tó ovast, tá kappast varð í Klaksvík. Hjá monnunum stóð finaludysturin ímillum ÍF og Mjølnir, og her gjørdist talan um ein spennandi dyst. Ending varð tó, at ÍF við einum 3-2 sigri tryggjaði sær rættin til at spæla í finaluni.

Hetta var líka sum eitt punktum fyri einum vónbroti hjá Mjølni, tí heldur ikki í kvinnudeildini eydnaðist klaksvíkingunum at spæla seg fram til steypafinaluna. Her stóð finalan millum ÍF og Mjølnir, og fuglfarðakvinnurnar gjørdu bart, tá tær vunnu ein tryggan 3-0 sigur.

Annars vann SÍ kvinnukappingina í bæði 1. og 2. deild. Í fyrstu deild var tað Fleyr, sum mátti lúta fyri sørvingunum, og í triðju deild gjørdist fuglfirðingar ov stuttir.

Hjá monnunum gjørdist Fleyr vinnari í 1. deild eftir finaludyst móti Fram, men sum eitt plástur á sárið fekk Fram tó steypið fyri kappingina í 2. deild.



*Sørvingar verða aftur í ár partur av steypafinaluni. Hetta tryggjaðu teir sær, tá teir vunnu ein sera spennandi finaludyst móti Mjølni*

*Mynd: SáH*

# Country konsert við Kristel og Jens Lisberg

KONSERT
*tíðindaskriv*

Leygarkvøldið 24. januar kl. 20 verður forvitnislig country- og gospelkonsert í ítróttahøllini á Hálsi í Havn.

Tað er hondbóltsfelagið, Kyndil, ið skipar fyri, og verða tað tey bæði, faðir og dóttir, Jens og Kristel Lisberg, sum saman við nøkrum av okkara bestu tónleikarum, fara at syngja og spæla.

Tónleikararnir verða : Ólavur Øster, Edvard Nyholm Debes, Magnus Johannesen, Rógvi á Rógvi, Arnbjørn Sivertsen, Jákup Zachariassen og Marner Lisberg. Kórsangarar eru Barbara og Harriet.

Unga stjørnuskotið Kristel er einans 15 ára gomul, men hevur longu gjørt vart við seg í føroyska tónleikalívinum og hevur saman við pápa sínum áður havt 4 konsertir.

Jens Lisberg kenna vit m.a. frá kenda tvørábólkinum Sputnik, har ið hann spældi saman við m.ø. bróðirinum Marneri.

Atgongumerkini kunnu keypast á Shell støðum í Havn og í Vestmanna, á , sum kosta kr. 150,- er at fáa á Shell-støðunum í Havn og í Vestmanna, í Kunningarstovuni í Havn, í Jinx og í 3-aranum í SMS.

